FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 3. mai 2022
J. nr.: 22/07887-3
Viðgjørt: BAB

Svar til fyrispurning nr. 52-176/2021 frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Una Rasmussen, um at útbyggja flogvøllin í Vágum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørjar eru ætlanirnar við at útbyggja komuhøllina á flogvøllinum í Vágum?
2. Hvørjar aðrar útbyggingar eru á skránni í næstum?
3. Hvat er tíðarætlanin fyri útbyggingunum?
4. Hvat kosta útbyggingarnar?
5. Hvussu verða útbyggingarnar fíggjaðar?
6. Nær verður byrjað at byggja?

Svar til spurning nr. 1.
Ætlanin er at víðka viðførismóttøkuna. Vága Floghavn hevur gjørt eitt skitsuuppskot at víðka móttøkuhøllina úr 250 fermetrum uppí 620 fermetrar. Hetta gevur møguleika fyri at tvífalda longdina á verandi viðførisbandi, umframt at tað verður meira rúmsátt.

Svar til spurning nr. 2.
Vága Floghavn arbeiðir við tveimum øðrum verkætlanum. Talan er um at gera brennievnisgoymslu og eitt standpláss til flogfør.

Svar til spurning nr. 3.
Verkætlanin at víðka viðførismóttøkuna er komið so mikið áleiðis, at myndugleikaverkætlan er í gerð. Miðað verður ímóti at hava nýggju hølini til reiðar áðrenn summarferðsluna 2023.

Lendisarbeiðið til oljugoymsluna er um at verða liðugt. Í hesum tíðum er tó ivasamt við veitingartíðum, millum annað á stáli, men gongur eftir vild verða tangarnir til reiðar at taka í nýtslu ímóti sumri komandi ár.

Nýggja standplássið verður ætlandi liðugt seinni í ár. Fyrivarni má takast fyri at tað kann verða trupult at fáa fyritøkur at gera arbeiðið.

Svar til spurning nr. 4.
Vága Floghavn upplýsir, at enn er ov tíðliga at siga, hvat kostnaðurin verður. Arbeiðini verða boðin út seinni í ár, og ikki fyrr enn tá ber til at siga nakað ítøkiligt um kostnaðin.

Svar til spurning nr. 5.
Vága Floghavn fíggjar hesar verkætlanir ávikavíst yvir raksturin og við lántøku. Í løtuni ber ikki til at siga neyvt, hvussu stórur partur verður fíggjaður við lántøku.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Svar til spurning nr. 6.
Sum nevnt er fyrireikandi arbeiðið við oljugoymsluni byrjað. Hini bæði verða boðin út seinni í ár, og vónandi verður ikki leingi til farvegur til byggiarbeiði verður at síggja.

Tinganes, 3. mai 2022

Uni Rasmussen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum